# Sansir trífaldað eftir trimum árum




*Lena Mohr og Høgni Rasmussen, stjórar á Sansum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fyri trimum árum síðani var manningin hjá Sansum 17, meðan hon var økt til 30 við seinasta ársskiftið**

VINNA
www.bl.fo

Hóast úrslitini á botnlinjuni fyri 2006 og 2005 ikki vóru nøktandi, kunnu tey á Sansum tó staðfesta, at tað eru pengar í marknaðarvinnuni. Og tað ger tað ikki verri, tá tú ført til uppgávu at marknaðarføra so mætar persónar sum Bill Clinton og Al Gore.

Tað er nógv ferð á hjá stóru marknaðarfyritøkuni Sansir í løtuni. Fyritøkan vinnur aftur pening, sum vit kendu hana mongu fyrstu árini eftir at hon varð stovnað.

Tað, ið eyðkennir marknaðarfyritøkur er, at tær vaksa sera skjótt, og trupult kann verða hjá leiðslunum at stjórna stóra vøkstrinum. Fyri trimum árum síðani var manningin hjá Sansum 17, meðan hon var økt til 30 við seinasta ársskiftið.

Sansir hevur eftir øllum at døma fingið fíggjarstýringina á rætta kós, og góður samanhangur er nú aftur at síggja millum umseting og úrslit á botnlinjuni.

Høvuðsvirksemið hjá Sansum fevnir um samskiftis- og tøkniloysnir. Sansir ráðgeva um marknaðarføring og gera kunningartilfar, forrita og gera heimasíðuskipanir og hava útgávuvirksemi.

| P/F Sansir - høvuðtøl (tkr) | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 14696 | 9033 | 5549 |
| Úrslit eftir skatt | 966 | -1312 | -536 |
| Eginpeningur | 209 | -689 | 566 |
| Eginpeningsavkast | 428 | 191 | -143 |

# Gongur sera væl hjá SEA-STAR

**Ein av skjótast vaksandi fyritøkum í Føroyum seinasta árini er byggifelagið SEA-STAR í Saltangará**

VINNA
*www.bl.fo*

Bruttovinningurin er seinastu fýra árini øktur úr 2,5 mió kr í 2003 til slakar 16,5 mió kr í 2007. Starvsfólkatalið er komið uppá umleið 50.

Sea-Star Contractors myndar høvuðsvirksemið innan samtakið.

Fyrsta uppgávan hjá felagnum var at víðka um havnalagið á Toftum, men tað vísti seg skjótt, at brúk var fyri Kjeld-monnum handan SEA-STAR uttan fyri landoddarnar.

Felagið hevur seinnu árini luttikið í fleiri størri verkætlanum í Grønlandi, mest innan havnalagsbygging og – dýping, men eisini hevur felagið luttikið í bygging av háhúsum, vegagerð og námsvinnu í Grønlandi.

Seinastu árini hevur felagið sett síni fingarmerki í stórar føroyskar byggiverkætlanir. Nevnast kunnu betongarbeiðið í nýggja Miðnámsskúlanum í Hovi, betongarbeiðið í millumbygninginum ímillum SMS og Tjaldurs Apotekið.

Samtøkan er býtt sundur í 3 eindir: Sea-Star Contractors, ið umfatar byggivirksemið, Sea-Star Diving, ið fevnir um Kavingararbeiði og Sea-Star Bilar, ið varð stovnað februar 2007 tá persónbilaverkstaðið hjá OCD varð keypt.

| Sp/f Sea-Star høvuðtøl (tkr) | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 16401 | 11200 | 4154 |
| Úrslit áðrenn skatt | 1107 | 2128 | 382 |
| Eginpeningur | 2793 | 1856 | 227 |
| Eginpeningsavkast | 42 | 114 | 136 |

## Nevndin í Føroya Havbúnaðarfelag hevur skipað seg

**Aðalfundur var í Føroya Havbúnaðarfelag 2. mai. Nevndin hevur nú havt sín fyrsta nevndarfund og hevur skipað seg soleiðis: Formaður er Ragnar Joensen frá Marine Harvest, næstformaður er Atli Gregersen frá Luna. Hinir í nevndini eru Bogi Jacobsen, Frímund Hansen og Regin Jacobsen. Odd Eliasen og Erhard Joensen eru valdir sum tiltakslimir.**

## Kunningartiltak um útlendska arbeiðsmegi

**Nú nýggjar reglur fyri útlendskari arbeiðsmegi koma í gildi 1. juli 2008, hava arbeiðsgevarar tørv á, at kenna nýggju reglurnar, og hvørjar nýggjar møguleikar hesar geva.**

**Vinnuhúsið skipar tí saman við løgmálaráðnum fyri kunningartiltakið á Hotel Hafnia 24. juni kl. 10.00.**

**Tað verða fólk úr Løgmálaráðnum og frá donsku útlendingamyndugleikunum, sum fara at kunna um nýggju reglurnar og um umsitingina av hesum.**

**Tilmelding til kunningartiltakið fer fram á www.industry.fo ella við at venda sær til Vinnuhúsið telefon 309900. Tilmeldingarfreistin er 23. juni á middegi.**